Tvøroyrar kvøldskúli veturin 2002/2003

Frítíðarundirvísing

Lærugrein:	**Tilmelding hjá**	**Tlf.**
Hondarbeiði	Judith Holm	371168
Seyming	Anna Mortensen	372810
Veving	Kirsten Danielsen	371934
Máling/tekning	Palle Julsgart	371669
	ella	371976
Matgerð (klænkikostur)	Tina Midjord	371962
(byrjar í viku 40)		
Fyrstahjálp	Naja Mortensen	371567
Tónleikur: Hornblástur	Jens Knudsen	223053
Kórsangur (gospel)	Jens Knudsen	223053
Kórsangur (blandað kór)	Jens Mortan Mortensen	375917

Undirvísing í teld:

Internetnýtsla og Heimasíðusmíð	Tim Wentzlau	372470
Tekstviðgerð	Páll Michelsen	371821

Venjingar í heitum vatni:
Skeiðið er ætlað teimum, sum hava MB. Becterew og liðagikt
Marjun Olsen 372888

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning av myndugleikunum.

Tilmeldingargjaldið er 100 kr. + 3 kr. fyri undirvísingartíman.

Tvøroyrar Kvøld- og Ungdómsskúli tlf. 371582

Starvslýsing

Sosial og Heilsuatstøðingur ella onnur við psykiatriskum royndum til Sambýli Eysturstræti 4.

Søkt verður eftir avloysara fyri fólk í farloyvi í tíðarskeiðinum 01.11.2002-01.06.2003.

Talan er um setanarbrøk 0,7 við arbeiði í dagtíð gerandisdagar.

Sambýli Eysturstræti 4 er karmur og heim fyri 5 sálarsjúk í aldri frá 23 til 45 ár.

Arbeiðið umfatar aktivering av íbúgvum inni og úti av stovninum. Vit hava nógvar avbjóðingar fyri framman og vænta tískil at tú ert álítandi, positivur og at tú ert ágrýtin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Eisini verður stórur dentur lagdur á, at umsøkjarin er nærlagdur og dugir at seta seg inn í sjúkrastøðuna hjá tí einstaka.

Lønar- og setanartreytir
Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sámal Lindenskov, deildarleiðara.

Sambýli Eysturstræti 4
Att.: Sámal Lindenskov
FO-100 Tórshavn

Til sølu

Kaffivognurin á Vestaru Bryggju til sølu, um hóskandi boð fæst.

Tlf. 311484 ella 251163

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3226, Sp/f KG Trading, 700 Klaksvík.

Viðtøkur broyttar:
19.08.2002.
Nevnd:
Innkomin í nevndina: Gisli Arnason Olsen, Strandbygade 30, 4.th., DK-6700 Esbjerg (formaður) og Jón Gunnarson, Stødlagøta 14, 160 Argir.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Gunnar Gunnarsson, Oman Mattalág 12, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Jón Gunnarson, Stødlagøta 14, 160 Argir.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av formanninum, einum stjóra ella tveimum nevndarlimum í felag.

Skráseting Føroya tann 19. september 2002

Kristin Balle

Tøknileiðari til SvF

Verandi tøknileiðari okkara leitar nýggjar leiðir og Sjónvarp Føroya søkir tí eftir nýggjum tøknileiðara.

Tøknileiðarin hevur ábyrgdina av viðlíkahaldi, supporti og útbygging av teknisku útgerðini hjá SVF, herundir eisini KT-kervinum. Hann umsitur alt innkeyp av KT- og tøkniútgerð. Hann leiðir dagligu tækni- og KT-serviseringina av framleiðslu og umsiting. Hann er leiðari fyri tækni- og KT-vørðarnar í húsinum, umframt fólkið, ið sendir. Somuleiðis stendur tøknileiðarin fyri útbúgving og skeiðvirksemi í sambandi við nýggja tøkni. Sjónvarpið er miðskeiðis í eini umfatandi umlegging av framleiðsluni frá analogari til digitala tøkni.

Tøknideildin er bygnaðarliga partur av framleiðsludeildini, ið samskipar og leggur tilrættis alla framleiðslu sjónvarpsins. 4 størv eru normeraði beinleiðis undir tøknileiðaranum.

Útbúgving og royndir:
Útbúgving innan KT- ella samskiftistøkni, ella tilsvarandi arbeiðsroyndir. Gott innlit í nýggjastu KT- og samskiftistøknina. Aðrar viðkomandi útbúgvingar og arbeiðsroyndir.

Royndir við arbeiði innan loftmiðlatøkni er ein fyrimunur, men eins stóran týdning hevur hollur kunnleiki til samskiftis- og KT-tøkni, og at tú hevur evnini at seta teg inn í nýggja tøkni og nýggjar uppgávur, analysera arbeiðsgongdir og finna og laga tøkniligar loysnir til tørvin í dagliga arbeiðinum hjá ymiskum starvsbólkum. Vit vænta okkum harumframt, at tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevni.

Fyri tann rætta umsøkjaran er talan um eitt sera spennandi starv, har tú hevur møguleikan at vera við at menna nýggjar loysnir og arbeiðshættir fyri stovnin komandi árini. Sjónvarpið sum miðil stendur framman fyri kollveltandi tøkniligum avbjóðingum, har nógvir nýggir møguleikar fyri samskifti við brúkaran standa í boði. Sum tøknileiðari verður tú við til at ávirka, hvørjar loysnir og hvørji tøknilig tilboð til hyggjaran, ið Sjónvarp Føroya skal leggja dent á í framtíðini.

Løn og setanartreytir:
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Miðað verður eftir at seta starvið frá 1. november, 2002, ella skjótast gjørligt.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 1. oktober, 2002.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra ella Jónheðin Tróndheim, tøknileiðara á telefon 340400.

SvF
Sjónvarp Føroya

Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, við fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF liggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi umframt handilsligum virksemi.

Parkeringsforboð

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at kommunustýrið hevur samtykt at seta parkeringsforboð í gildi á kommunalum vegi inni í bygdini, fyri bilar yvir 3,5 tons.

Hósvíkar kommuna

Sera bíligt gardintoy
Útsølan hjá Gardinbúðini á Toftum heldur fram
Nógv gott toy er eftir
Opið er leygardagin frá kl. 10-19
Aðrar geradisdagar frá 16-19
Gardinbúðin
Toftir · tlf. 448001

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

MERCEDES BENZ 300 TIL SØLU
aut. gear, centrallás, sóltak, elrútar, árg. 1987, kr. 45.000,-
Tlf. 218181

SUZUKI SWIFT
5 hurðar, bláur, árg. 99, er í sera góðum standi, koyrt 63.000 km, sera økonomiska drift.
Tlf. 224439

MITSUBISHI GALANT GLS 2.0
aut. gear, árg. 88, sýnaður 8/2002, í góðum standi. Til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 313340 ella 213340

TOYOTA HIACE YNSKIST
Toyota Hiace ynskist við ella uttan plátur, skal kunna koyra.
Tlf. 226099

SPORTFELGUR
til Honda Accord 1.8 bíliga til sølu.
Tlf. 375272

DEKK
205/55/16 ZR (brúkt) 2 stk. til sølu fyri 400,-
Tlf. 441765 ella 442115

MAZDA 323
1.3 árg, 88. Er tað nakar, ið hevur ein Mazda standandi og vil sleppa av við hann?
Tlf. 220558

YNSKIST
Er tað nakar, sum liggur inni við 4 felgum til ein Toyota Carina (5 hol) sum eg kann keypa.
Tlf. 222401 ella 448145

FORD ESCORT 1.8 DIESEL
árg. 97, km 105.000, reyður, 3 hurðar, nýsýnaður 09/02. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 256686 ella 372090

TOYOTA CARINA 2.0 GLI
til sølu, árg. 8/91, koyrt 158.000 km, hevur sóltak og vel, sportfelgur, góð heilársdekk, er í góðum standi. Boð undir 40.000 kr. hava ikki áhuga.
Tlf. 449028 ella 223155

RENAULT 1.9 TIL SØLU
Nýsýnaður Renault 1.9 frá 7/94, koyrt 98.000 km til sølu.
Tlf. 210408

TOYOTA COROLLA 1.4 VVT-i
til sølu, árg. 5/00, 3 hurðar m. bláur, koyrt 17.600 km.
Tlf. 316662 ella 252656

MAZDA 323
árg. 99, 2.0 Diesel, til sølu. Sony anlegg og 17" sportfelgur fylgja við.
Tlf. 317602 ella 250102

NISSAN SUNNY
Ein Nissan Sunny 1.6, N13, árg.1989 til sølu sum eykadeilir. Hann hevur nýtt útstoyt, tvey sett av stoytdoyvarum.
Tlf. 448145 eftir kl. 17

DAIHATSU CHARADE G100
árg. 01/88, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 262094 ella 447440

TOYOTA CAMRY 1.8 XL
árg. 87, til sølu.
Tlf. 455291 ella 215291

HONDA CIVIC 1.5i V-TEC
Vinreyður Honda Civic til sølu. Er frá 04/96 og er vælhildin. Nógv eykaútgerð.
Tlf. 332360

OPEL CORSA 1.5 D
árg. 89, krevur ábøtur, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 312954

PEUGEOT 106 DIESEL
nov. 94 til sølu. Seldur vegna keyp av tørri bili.
Tlf. 422326 ella 262133

DEKK TIL SØLU
4 stk. std. 15/70-14R, lameldekk, merki »Blizzar« Bridgestone, til sølu fyri 2.500,- Nýprísur 4.200 óbrúkt.
Tlf. 218696 ella 444696

FÝRA DEKK
Fýra dekk, stk. 265/70-R15 til sølu fyri 2000,- Koyrt sera lítið.
Tlf. 218696 ella 444696

BMW 524 TD
árg. 91, vínreyður, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 443205 ella 215707

TIL SØLU
Ein motorur v. gearkassa til Mazda 323, árg. 84-89, bíliga til sølu.
Tlf. 252072

PÍKADEKK
Fýra nýggj píkadekk stødd 175/80/14 bíliga til sølu.
Tlf. 252072

TOYOTA CARINA II
frá 85 (bert koyrt hetta seinasta árið í FO, hini árini í DK). Hevur skaða á v. horni framman, annars í góðum standi. Hevur nýggj heilársdekk og Sony stereoanlegg. Verður selt saman ella hvørt sær. Um tygum hava áhuga, ring
tlf. 456587

TOYOTA COROLLA 1.3 XLI
árg. 90 til sølu. Bilurin hevur nýggjan kølara og bremsuskivur og er í góðum standi. Fløguspælari er í bilinum.
Tlf. 264112 eftir kl. 16

TOYOTA AVENSIS
Silvurgráur Toyota Avensis Terra Sedan 2.0 TD, árg. 02/02 til sølu.
Tlf. 423311

4 FELGUR VIÐ DEKKUM
stødd 195/65-15" hol avstandur 100 mm/ 4 hol passa m.a. til Renault Laguna til sølu fyri 1800 kr.
Tlf. 318675

MOTORUR YNSKIST
Motorur til Daihatsu Charade bensin, ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 447832 helst eftir kl. 17

TIL SØLU
2 mór. gomul dynamo passar til allar bilar. Ring millum 12.00-13.00 ella aftaná 18.00
á tlf. 455062

ÓVIRKIN SAAB 900
kann brúkast sum eykalutir, til sølu.
Tlf. 260334

Amboð

BLANDIMASKINA
Brúkt blandimaskina ynskist til keyps.
Tlf. 447565 ella 260887

TIL LEIGU
Stillads til leigu. Við koyring og uppseting.
Tlf. 424426/214426, Jógvan Johannesen

Arbeiði

ÁLÍTANDI
og røsk genta/kvinna søkist til reingerð í privathúsum uml. 2 tímar um vikuna.
Tlf. 259284 eftir kl. 17.00

ALLUR ÚTGREVSTUR
og planering verður gjørd við brøyt. Ring og hoyr meira.
J. H. Brøyt tlf. 424455, 229225 ella 214301

MONTØRUR SØKIST
til at montera garaguhurðar. Tú mást kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera arbeiðssamur og álítandi. Helst búgva á streymoyarøkinum. Ring og hoyr nærri á tlf. 217686 ella 217802.
Sp/f Garaguhurðar

BROTFLÍSAR
Maður søkist at leggja brotflísar í lítlum urtagarði.
Hanna - tlf. 314483

VASKIARBEIÐI SØKIST
17 ára gomul genta søkir vaskiarbeiði 2-3 ferðir um vikuna, seinnapartar (ikki privat). Vinarliga ring
tlf. 221506 eftir kl. 15

YMISKT MASKIN-
jarnsmiðjuarbeiði verður gjørt av fakmanni.
Ring 251996 í Suðuroy

ALT
innan húsasmíð.
Tlf. 220387 ella 361977

Barnaútgerð

BRIO KOYRISTÓLUR
koksgráur, leðurlook, svart stell, galesja – til sølu fyri 500,- kr.
Tlf. 441765 ella 442115

CHICCO BILSTÓLUR
Chicco bilstólur, 0-18 kg, og høgur barnastólur til sølu fyri kr. 450,-
Tlf. 256887 ella 311747

KLÆÐI V.M.
Nakað av babyklæðum, leiku og ein snugglipsi til sølu fyri kr. 400,-
Tlf. 251197

PARAPLYKLAPPVOGNUR
Ein Chicco paraplyvognur, myrkabláur, smámynstrutur og við ryggstilling til sølu fyri kr. 350,- Nýprísur 850,-
Tlf. 251197

TIL SØLU
Barnasong og grulvigarður til sølu.
Tlf. 310677

SKIFTIBORÐ/PUSLIBORÐ
at hanga upp á veggin, tekur ikki nógv pláss, til sølu fyri 500,- kr.
Tlf. 264909 ella 0045 21827606

BARNAVOGNUR TIL SØLU
5 mór. gamal barnavognur við lyft bíliga til sølu. Sera væl hildin og lítið bróktur. Til sølu fyri einans 1.400,- kr.
Ring á tlf. 313143

GRULVIGARÐUR
ynskist til keyps.
Tlf. 318805

SIMO BARNAVOGNUR
við lufthjólum, í góðum standi, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 311263 ella 211263

TIL SØLU
Bláur Brio barnakoyristólur við regnslagi, selum og kurv, fyri 1.800,- Sera væl viðfarin.
Tlf. 371937 ella 211937

Bátaútgerð

BÁTAMOTORUR
Púra óslitin TD 61 Volvo motorur til sølu.
Tlf. 422457 ella 223897

VÍKINGUR FD 109
til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 448195 ella 218195

MARINER 25 HK
við manøvrebox og tanga til sølu.
Tlf. 221122

SKANTI VHF 3000
fleiri eyka horn kunnu setast til. Er sum spildurnýggjur, ongantið settur upp. Til sølu fyri 3.400 kr.
Tlf. 332888

ALUM. FISKAKASSAR
4 aluminiums fiskakassar á kr. 3000,- pr. stk. og stampailøt á kr. 100 pr. stk.
Tlf. 282722 eftir kl. 18

NEYST Í VÁGI TIL SØLU
um hóskandi boð fæst.
Tlf. 373995 ella 226833

Bingo

STÓRT SEYÐABINGO
verður mánakvøldið 30. sept. kl. 19.00 í Trongisvágs skúla. 20 seyðir vera at vinna, umframt nógv annað. Hvørt bingo 1 seyður og á lutaseðli 8 seyðir.
Flogbóltsdeildin TB

BINGO
Gott bingo verður á Strondum sunnudagin 29. sept. kl. 17.00. Burturlutað verður m.a. 2 føroysk krov í heyst og gávukort á 1.000 kr. Eisini verða lúkur at lata upp.
Strálan

BINGO
Gott bingo verður í TB-húsinum mánadagin 23. september kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2 x 500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

BINGO
verður í Pálsstovu leygardagin 21.sept. kl. 15.00. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Á lutaseðli ein Apex flogferð. Bingola. Eykaspæl. Koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

GOTT BINGO
verður í Framtíðini sunnudagin 29. sept. kl. 16.00. Full pláta 300 kr. á lutaseðli m.a. seyður.
Vágs Svimjifelag

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 22.9. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1000 kr. Eykaspælið 1600 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 5. oktober kl. 16. 12 plátur 100 kr. Drigið verður ímillum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík sunnudagin 22. september kl. 16. Høvuðsvinningur á lutaseðlinum er eitt lamb og gávukort á 500 kr. 12 plátur 100 kr. Drigið verður í millum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

TIL SØLU
Eini 90 Anders And bløð til sølu fyri 250 krónur.
Tlf. 311346

Burturm. /funnið

EITT
Barbie ur funnið á Gerðisvegi, Saltangará.
Tlf. 447747

NOKIA 3330 BURTURMIST
Ein Nokia 3330 fartlf. burturmist á Café Natúr leygarkvøldið 15.9. Finnarin verður biðin um at ringja á
tlf. 443328

GAGGUR BURTURBLIVNAR
við barnagarðin í Øksnagerði. Stødd uml. 32, svartar við hvítum reyðum á. Veit onkur um tær, vinarliga ring
212345

TANN
sum av misgáum hevur tikið mína tasku á Farstøðini tann 28.8. vinarliga ringa
tlf. 221865 ella 332991

SVØRT HONDTASKA
Hevur nakar funnið eina svarta hondtasku í býnum í Havn? Har var ein pink Nokia telefon, mappa og annað.
Tlf. 371575

EFTIRLÝSING
2 súkklur: Onnur reyð, Kilimanjaro gentusúkkla við 21 gearum. Hin gul Mosquito damusúkkla við 7 gearum, horvnar av trappuni í Blonkugøtu 11 á Norðasta horni náttina til sunnudagin 8.9. Finningarlon verður givin.
Tlf. 310314 ella 210314

KAGGIN
Fólk, ið hava gloymt klæðir í Kagganum verða biðin um at heinta tey, ella verða tey latin til vælgerandi endamál.
Nevndin

Býli

YNSKIST TIL LEIGU
Hús í Porkeri ynskjast til leigu.
Tlf. 225202

KAMAR TIL LEIGU
í Vesturbýnum við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu.
Tlf. 221158 ella 313799

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN TIL SØLU
1 verilsis íbúð í Husum til sølu. Gott buss- og toksamband. 20 minuttir til miðbýðin. Íbúðin er partvís møblerað, nýístangjørd og klár at flyta inn í. Prísur Kr. 400.000,00
Tel: 224524 ella 421180

FASTLØNT KVINNA
við 10 ára gomlum soni søkir íbúð í Tórshavnar økinum. Latið max 4.500,- við ljós og hita um mór.
Tlf. 211981, Guðrið

ERT TÚ EIN
ið javnan er í Havn í arbeiðsørindum ella gjøgnumreisandi, ikki fastbúgvandi, so havi eg eitt kamar við bað.
Tlf. 316219

TIL LEIGU
Rúmlig hús í miðbýnum í Havn til leigu, barnavinarligt umhvørvi, urtagarður, góðir parkeringsmøguleikar.
Nærri uppl. á tel. 224553 / 319005

HANDILSHØLI/KIOSK
í Vági bíliga til leigu.
Tlf. 374046

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð í Tórshavn ynskist. Vit eru eitt par 22 og 24 ár. Vit eru friðarlig og gjalda til tíðina.
Tlf. 262173 ella 424721

FERÐIST Í ELDUVÍK
Hús til leigu fyri styttri tíðarskeið.
Tlf. 315638 ella 257383 eftir arbeiðstið

FERÐIST Í NÓLSOY
Hús til leigu fyri styttri tíðarskeið.
Tlf. 317691 ella 257383 eftir arbeiðstið

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki